# 30 ár



**RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD 30 ÁR**

Ábyrgd: Ráðið fyri Ferðslutrygd

Tekstur: Uni Arge
Prent: Føroya Prent

Layout: Stephanssons Hús



# 30 ár

## RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

Ráðið fyri Ferðslutrygd 2006



# INNIHALD:


| | |
|---|---|
| RFF 30 ár á baki - Rúna Sivertsen | s. 6 |
| Nullhugsjónin er málið - Bjarni Djurholm | s. 7 |
| Ráðið fyri Ferðslutrygd verður stovnað | s. 8 |
| Velja formann og dagligan leiðara | s. 10 |
| Leggja propagandu til rættis | s. 12 |
| Trupul byrjan og krav um ávirkan | s. 14 |
| Ráðið slær ring um børnini | s. 16 |
| Skrivstova við mongum leiklutum | s. 18 |
| Venda sær til ungdómin við tónleiki | s. 20 |
| Fleiri bilar og fleiri vanlukkur | s. 22 |
| Tey syndarligu áttatiárini | s. 24 |
| Tætt samband við skúlarnar | s. 26 |
| Fáa nýggjan íblástur úr Svøríki | s. 28 |
| Viðtøkurnar verða dagførdar | s. 30 |
| Ráðið skrivar álit um Nullhugsjónina | s. 32 |
| Ungir menn oftast í deyðsvanlukkum | s. 34 |
| Løgtingið fagnar Nullhugsjónini | s. 36 |
| Fólk í RFF síðan 1976 | s. 38 |

# RFF 30 ár á baki



Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í ár virkað fyri tryggari ferðslu í Føroyum í ein mansaldur. Hesi 30 árini hava nógvar góðar kreftir arbeitt fyri at gera boðskapin hjá ráðnum sjónligan í samfelagnum. Tað vóru eldsálir, sum sjálvbodnar løgdu lunnar undir ráðið, og tað var ikki av tilvild, at hetta hendi í sjeytiárunum. Vaksandi bilatalið og útbygda samferðslukerviðkravdu, at spurningurin um ferðslutrygd varð settur á dagsskránna.

Tað er tíverri ein sannroynd, at tá útbyggingar verða framdar í samfelagnum, hugsa politikararnir mest um nyttu, kostnað og skjótleika. Teir hava lyndi til at gloyma trygdarspurningin. Hetta harmar okkum í Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Vit kunnu ikki loyva okkum at gloyma trygdina. Vit skulu ikki góðtaka, at fólk doyggja og verða illa løstað í ferðsluni. Saman mugu vit øll arbeiða fyri, at ongin doyr ella verður illa løstaður á føroysku vegunum.

Hetta er einfalda málið við Nullhugsjónini. Við teimum mongu tilmælunum í drúgva álitinum er grundarlagið lagt undir ferðslutrygdarpolitikkin í Føroyum í framtíðini. Nú vantar bert, at politikararnir taka tilmælini til sín og fremja tey í verki. Tað er próvfast, at Nullhugsjónin økti munandi um ferðslutrygdina, tá sviar fóru at arbeiða eftir henni. Tí heiti eg inniliga á landsins myndugleikar um at bera so í bandi, at ferðslulógin, nú hon verður broytt, fer at byggja á Nullhugsjónina.

Ritið, sum tygum hava í hondini, er gjørt í sambandi við 30 ára føðingardagin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Tað lýsir í stuttum søguna hjá ráðnum frá 1976 til 2006. Myndir, tekningar og talvur styðja upp undir frásøgnina. Tað er mín vón, at ritið kann vísa, hvussu nógva orku eldsálirnar í ráðnum hava lagt í ferðslutrygdararbeiðið hesi 30 árini. Tað er eisini mín vón, at søgan kann eggja okkum øllum til at halda fram við at gera ferðsluna tryggari.

**Rúna Sivertsen, formaður**

# Nullhugsjónin er málið



Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur 19. januar 2006 virkað í 30 ár. Hóast ferðslan í sama tíðarskeiði er økt nógv, er talið á ferðsluóhappum minkað niður í helvt, og talið á teimum, ið doyggja í ferðsluni, er minkað uppaftur meira. Tað er eingin ivi um, at Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur havt ein stóran leiklut at ávirka gongdina tann rætta vegin, bæði við teimum kunningarátøkum, sum ráðið hevur staðið fyri, og við at ávirka hugburðin hjá lands- og kommunalpolitikarum, so hesir hava tikið spurningin um ferðslutrygd í størri álvara og sett í verk ítøkilig tiltøk. Eisini hevur Ráðið fyri Ferðslutrygd virkað sum netverk hjá teimum, sum hava ein leiklut í ferðslutrygdini í Føroyum.

Hóast gongdin í ferðsluhagtølunum bendir á, at vit eru á rættari kós, eru vit ikki enn komin á mál. Stavnhaldið er nevniliga, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni. Ferðslan økist ár undan ári, og um vit lata standa til, økist eisini vandin fyri, at fólk doyggja ella verða álvarsliga skadd í ferðsluni. Tað er tí neyðugt allatíðina at gera nýggj tiltøk fyri at minka um vandan fyri álvarsligum ferðsluóhappum. Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur gjørt sítt fyri at varpa ljós á hetta týdningarmikla evni, m.a. við at lata úr hondum frágreiðing um Nullhugsjónina, sum var grundarlag undir aðalorðaskifti á løgtingi.

Av tí, at fíggjarliga og umsitingarliga orkan er avmarkað, er alneyðugt, at vit raðfesta tiltøkini rætt og byrja, har trupulleikarnir eru størstir. Verður hugt at hagtølunum sæst, at serliga tveir bólkar eru yvirumboðaðir í ferðsluóhappum við fólkaskaða ella deyða: ungir, mannligir bilførarar og børn til gongu. Um vit fáa sett tiltøk í verk, sum minka um títtleikan á óhappunum í hesum bólkum, eru verulig útlit fyri, at vit kunnu nærkast Nullhugsjónini. Komandi árini verður hetta tann stóra avbjóðingin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd og øllum, sum varða av ferðslutrygdini í Føroyum.

Eg fari við hesum at ynskja Ráðnum fyri Ferðslutrygd hjartaliga tillukku við 30 ára degnum við vón um, at ráðið eisini í framtíðini fer at verða ein líka virkin og sjónligur partur á ferðslutrygdarøkinum.

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður**

# Ráðið fyri Ferðslutrygd verður stovnað

Mánadagin 19. januar í 1976 stevndu umboð fyri 13 ymsar stovnar, fyritøkur og feløg í Føroyum saman til fundar á skrivstovuni hjá Tryggingarsambandinum Føroyar í Havn at stovna eitt ferðsluráð.

Sjálvur stjórin, Marius Thomassen, beyð vælkomin og greiddi frá, at tað var ein gamal tanki hjá Tryggingarsambandinum at stovna eitt ráð fyri tryggari ferðslu í Føroyum.

Marius Thomassen upplýsti, at arbeitt hevði verið við málinum síðan 1974. Hini norðurlendsku ferðsluráðini vóru fyrimyndin, og uppskot til viðtøkur var skrivað, sum fundurin skuldi taka støðu til.

Tað var ikki av tilvild, at júst Tryggingarsambandið gekk á odda at stovna ráðið. Har sóu tey hvønn dag avleiðingarnar av, at ferðslan var nógv vaksin, og Marius Thomassen helt, at alneyðugt var nú at fáa samskipað øll tiltøk at gera ferðsluna tryggari.

Fundurin umrøddi gjølla hvørja grein sær í uppskotinum til viðtøkur. Umboðið fyri lógarnevndina hjá løgtinginum, Erlendur Patursson, helt, at í staðin fyri "Ráðið fyri tryggari ferðslu" skuldi ráðið eita "Trygg ferðsla."

Men hvørki av hesum nøvnum vann frama. Umboðið fyri Føroya Skúlastjórn, Petur Jacob Sigvardsen, skeyt upp, at navnið varð broytt til "Ráðið fyri Ferðslutrygd." Atkvøtt varð um hetta uppskotið, og tað varð samtykt við sjey atkvøðum.

Samtykt varð eisini, at ovasti myndugleiki var ráðið sjálvt. Undir ráðnum skuldu vera ein starvsnevnd við formanni og næstformanni og ein dagligur leiðari. Landsstýrið, Tryggingarsambandið Føroyar og kommunurnar skuldu fíggja virksemið hjá ráðnum.

1

**Fyrsta fundarfrágreiðingin**

Alt, sum varð umrøtt á stovnandi aðalfundinum, varð niðurskrivað. Í fyrstu fundarfrágreiðingini sæst, at nýggja ferðsluráðið skuldi eita "Ráðið fyri tryggari ferðslu." Men navnið varð broytt í síðstu løtu.



Síðani vórðu viðtøkurnar settar undir atkvøðu við teimum framm-
fyri nevndu broytingaruppskotum, og vóru tær samtyktar við lógvabresti.
Endaliga orðingin í viðtøkunum kom sostatt við onkrum smávegis máls-
ligum rættingum at verða:
§ 1 NAVNIÐ á ráðnum er: "RÁÐIÐ FYRI ~~TRYGGARI FERÐSLU~~". FERÐSLUTRYGD

1

2







3

**Hesi møttu á stovnandi fundinum 19. jan. 1976:**

Hjalgrim Hilduberg, Landsstýrið

Frimod Poulsen, Føroya Landfúti

Erlendur Patursson, Løgtingsins lógarnevnd

Jógvan Nolsøe, Landsverkfrøðingurin

Atli Jensen, Bileftirlitið

Marius Thomassen, Tryggingarsambandið Føroyar

Eilif Samuelsen, Føroya Lærarafelag

Óli Mikkelsen, Føroya Læknafelag

Lasse Klein, Føroya Kommunufelag

Ingolf Gunnarson, Føroya Bilklubbi

P. J. Sigvardsen, Føroya Skúlastjórn

Eva Thomsen, Kvinnufelagssamskipan Føroya

Óli Jacobsen, Føroya Koyrilærarafelag

Á fundinum vóru eisini Bjartur Dalsgarð, skrivstovumaður, og Tórmóður Djurhuus, advokatur.

2
**Marius Thomassen**
Tryggingarsambandið Føroyar tók stig til at stovna Ráðið fyri Ferðslutrygd. Oddamaður har var Marius Thomassen. Hann setti stovnandi fundin í 1976.

3
**Petur Jacob Sigvardsen**
Sum umboð fyri Føroya Skúlastjórn fór hann heilhugaður til verka frá fyrsta degi. Petur Jacob Sigvardsen átti hugskotið til navnið Ráðið fyri Ferðslutrygd. Var formaður frá 1993 til 2004 og næstformaður frá 1976 til 1993. Er nú heiðurslimur.



ENDAMÁL ráðsins er at skapa størri trygd í ferðsluni við upp-
lýsing fyri at fáa øll vegfarandi at skilja týdningin av at
bera seg at, sum ferðslulógin sigur.
at skipa fyri trygdarfremjandi tilgøkum, so sum upptøku og fram-
sýning av filmum yvir ávísar vandamiklar ferðslutilburðir, fyri-
lestrum, ferðsluupplýsing í bløðum, útvarpi, ljósmyndarhølum o.tl.
at ganga inn fyri kravdari ferðslulæri í skúlum, barnagørðum o.tl.
at verða við til fastar regluligar kanningar av skaðaorsøkum, og
at fáa vegir og vandamikil støð ferðslutryggari.

1

# Velja formann og dagligan leiðara

Endamálsorðingin fyri ráðið var stutt, men boðaði frá, at ætlanirnar vóru bæði nógvar og stórar.

Har stóð fyrst, at málið var at skapa størri trygd í ferðsluni við upplýsing "fyri at fáa øll vegfarandi at skilja týdningin av at bera seg at, sum ferðslulógin sigur."

Síðan varð gjørt greitt, at hetta málið skuldi røkkast við at taka upp og vísa filmar um vandamiklar ferðslutilburðir, halda fyrilestrar kring landið og bera fram upplýsing í bløðum, útvarpi og ljósmyndarhølum.

Ráðið skuldi haraftrat virka fyri kravdari ferðslulæru í skúlum og barnagørðum, vera við til at gera kanningar av skaðaorsøkum og fáa vegir og vandamikil støð ferðslutryggari.

Viðtøkurnar staðfestu, at "starvsnevndin leggur propagandu ráðsins til rættis so langt fram í tíðina sum gjørligt."

Men skuldi hetta fáast frá hondini, mátti fólk setast at taka sær av virkseminum, og tað var høvuðsevnið á næsta fundinum 29. mars í 1976.

Á hesum fundi varð útvarpsstjórin, Niels Juel Arge, valdur til fyrsta formann í ráðnum. Ludvig Petersen varð vegna Føroya Skúla-



2

3





4

stjórn valdur til næstformann. Í starvsnevndina vórðu eisini vald Óli Mikkelsen fyri Føroya Læknafelag, Eva Thomsen fyri Kvinnufelagssamskipan Føroya og Bjartur Dalsgarð fyri Tryggingarsambandið Føroyar.

Umrøtt varð á hesum fundinum, hvør skuldi gerast dagligur leiðari. Avrátt varð at lýsa starvið leyst. Hesum skuldi starvsnevndin taka sær av. Eisini fekk hon litið upp í hendi at fáa til vega skrivstovuhølir. Tey vórðu seinni funnin við Hoydalsvegin í Havn.

Fyrsti dagligi leiðarin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd varð settur á ráðsfundi 18. august 1976 á Hotel Føroyum. Umsøkjararnir vóru 12 í tali, og ráðið setti Eli Nolsøe, fyrrverandi landsstýrismann, í starvið. Hann gjørdist samstundis skrivari hjá ráðnum.

1
**Endmálið fest á blað**
Á stovnandi aðalfundinum varð viðgjørt, hvat skuldi standa í viðtøkunum hjá ráðnum. Hetta gjørdist úrslitið.

2
**Ferðslan nógv økt**
Ráðið fyri Ferðslutrygd varð stovnað, tí ferðslan øktist nógv í sjeytiárunum. Eisini fólk til gongu komu í størri vanda av øktu ferðsluni.

3
**Niels Juel Arge**
Fyrsti formaðurin og ein av eldsálunum í ráðnum. Niels Juel Arge gjørdi fyrra helming av sjeytiárunum fleiri sendingar um ferðslu í útvarpinum. Áhugi hansara fyri ferðslutrygd og atgongd hansara til sterka útvarpsmiðilin vóru tvær høvuðsorsøkir til, at hann varð kosin formaður í 1976. Hann var formaður út í eitt til 1993.

4
**Eli Nolsøe**
Sum fyrsti dagligi leiðarin hjá ráðnum fekk hann til uppgávu at fáa skrivstovuna at virka. Eli Nolsøe var leiðari frá 1976 til 1978, tá hann flutti aftur til Klaksvíkar. Í hansara tíð sum dagligur leiðari helt ráðið til við Hoydalsvegin. Eli var eisini skrivari hjá ráðnum.


Á alfaravegi


Til-lukku!

# Leggja propagandu til rættis

Tá tey formligu viðurskiftini vóru fingin í rættlag, kundi ferðsluráðið fara til verka. Virkishugurin var stórur. Fimm fundir vórðu hildnir frá august til desember 1976, og nógvir ymsir spurningar vórðu viðgjørdir.

Ein spurningur, sum beinanvegin kom upp at venda, var at fáa til vega føroyskt tilfar um ferðslu til skúlarnar. Ein annar spurningur var at fáa gjørd endurskin at lata fólki, so bæði fólkini og ráðið sjálvt kundu gerast sjónligari í ferðsluni.

Tey fyrstu endurskinini vórðu fíggjað soleiðis, at Tórshavnar og Klaksvíkar kommuna keyptu ávíkavist 5.000 og 2.000 endurskin frá ráðnum. Á teimum, sum Havnin fekk, stóð øðrumegin við reyðum “Havnin skal skína.” Hinumegin stóð við bláum navnið á ráðnum.

Ráðið prentaði eisini sítt navn við bláum á endurskinini, sum fóru til Klaksvíkar. Men har stóð við reyðum “Reinur og fríður – Klaksvíkar býur.”

Stutt eftir vórðu 10.000 endurskin bíløgd aftrat. Ráðið prentaði aftur sítt egna navn øðrumegin. Men hinumegin valdi starvsnevndin nú at vísa á vandarnar á alfaravegi við slagorðinum “Lívið er eittans.”

Eitt annað mál, sum varð viðgjørt hesar fyrstu mánaðirnar, var at fáa til vega hagtøl um ferðslu. Marius Thomassen helt, at ráðið skuldi fáa til vega hagtøl um, hvørji sløg av akførum vóru í landinum, og hvar og hvussu óhappini hendu.

Umboðið hjá Bileftirlitinum, Atli Jensen, ráddi ráðnum til at fara undir eina landsumfatandi lyktakanning. Hann helt, at bilverkstaðir og bilasølur kundu standa fyri kanningini.

Niels Juel Arge, sum hevði havt fleiri sendingar um ferðslu í útvarpinum fyrra helming av sjeytiárunum, mælti til, at ráðið tók upp samband við fjølmiðlarnar. Ráðið skuldi gera eina raðfesting hesum viðvíkjandi, helt hann.

Á einum fundi kom eisini fram, at Bileftirlitið og landsstýrið umrøddu, hvussu nýtslan av trygdarbelti kundi gerast lógarkravd. Ráðið gjørdi av at kanna, hvørjar grundgevingar norðmenn høvdu fyri kravdari nýtslu.

Ráðið fekk sær eisini egið búmerki, sum Ingvør Nolsøe teknaði.

FERÐSLUTRYGD



**Atli Jensen**
Bileftirlitið hevur frá byrjan verið ein virkin limur í ráðnum. Hann, sum hevur umboðað Bileftirlitið longst í RFF, er Atli Jensen. Hann var sum fleiri aðrir ein eldsál í ferðslutrygdararbeiðinum og hevði mong hugskot um, hvussu ferðslan kundi gerast tryggari. Lyktakanningarnar í sjeytiárunum og áttatiárunum vóru hansara hugskot.

# Trupul byrjan og krav um ávirkan

Tann fyrsti regluligi ársfundurin hjá ráðnum varð hildin á Hotel Føroyum 13. mai í 1977. Har fingu formaðurin og hinir limirnir í ráðnum høvi til at draga saman um virksemið higartil.

Ráðið hevði væntað sær 476.000 krónur tilsamans til dagliga raksturin. Kommunurnar skuldu gjalda 76.000 krónur, og landsstýrið og Tryggingarsambandið skuldu koma við 200.000 krónum hvør. Men formaðurin visti at siga, at ráðið fekk minni enn helmingin av hesi upphædd.

Niels Juel Arge staðfesti: "Tað fyrsta, vit koma at gera, verður at steingja skrivstovuna. Dagligi leiðarin hevur lisið skriftina á bróstinum og hevur sagt starvið frá sær ella fer at gera tað í næstum. Góðu ferðsluráðslimir, her er nakað hjá okkum at taka støðu til í dag."

Fundarluttakararnir harmaðust um, at so illa skuldi standa til fíggjarliga. Ludvig Petersen helt, at tann tíðin var helst farin, at fólk fingust at arbeiða fyri onki, og komu ikki fleiri pengar, kundi endin gerast, at arbeiðið datt niðurfyri.

Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, helt ikki, at ráðið skuldi leggja arbeiðið niður. Dyrgjast skuldi eftir meira peningi frá landsstýrinum, helt hann. Eftir nógva umrøðu um fíggjarligu viðurskiftini samtykti ráðið at senda landsstýrinum eina áheitan um meiri pening.

Formaðurin skeyt á fundinum upp, at ráðið heitti á kommunurnar og landsstýrið um at senda ráðnum allar ætlanir um vegagerð til ummælis. Rættari var at síggja og ávirka ætlanirnar, áðrenn tær vórðu settar í verk, í staðin fyri at finnast at aftaná, helt Niels Juel Arge.

Hann staðfesti eisini, at Føroyum tørvaði nýggja ferðslulóg. Tann, sum var í gildi, var frá 1963. Landsstýrið hevði sett eina nevnd at orða uppskot um nýggja lóg, men hon hevði onki gjørt, og kom onki burturúr, skuldi ráðið mæla til at taka nevndina av og seta eina nýggja, sum vildi gera nakað, segði hann.

Hann endaði soleiðis: "Koyrikortið er ongin mannarættur. Kanska áttu vit í eini nýggjari ferðslulóg at havt serligar reglur fyri teir tríggjar aldursbólkarnar: Undir 21 ár, millum 21 og 60 ár og yvir 60 ár. Harumframt átti bilførari, sum ferð eftir ferð breyt ferðslulógina, at mist kortið."

"Tað fyrsta, vit koma at gera, verður at steingja skrivstovuna. Dagligi leiðarin hevur lisið skriftina á bróstinum og hevur sagt starvið frá sær ella fer at gera tað í næstum.
Góðu ferðsluráðslimir, her er nakað hjá okkum at taka støðu til í dag.

**1**
**Oskar Hermansen**
Virkaði sum dagligur leiðari nakrar mánaðir í 1978, tá Eli Nolsøe var farin frá. Hansara lutur í ferðslutrygdararbeiðinum var tó størri enn so. Hann yrkti, fann uppá og týddi fyri ráðið í mong ár.

**2**
**Olivur Næss**
Ótroyttiligi leiðarin frá 1978 til 1992. Saman við Oskari var hann fremsta kreativa kraftin í ráðnum

**3**
**Fleiri bilar og landið útbygt**
Bilatalið øktist nógv eftir 1970, og tað setti krøv til teirra, sum skuldu gera ferðsluna trygga. Ein grund til, at bilatalið øktist, var, at samferðslukervið varð útbygt. Ikki minst var tað eitt stórt framstig, tá brúgvin um Streymin, sum bant Eysturoy og Streymoy saman, varð tikin í nýtslu í 1973.



1



2




3






1

> Ferðsluringur Barnanna vendi sær til børn millum 3 og 7 ár og fór av álvara at virka í 1984.



2



3

**1**
**Ferðsluringur Barnanna**
Frá fyrsta degi legði RFF stóran dent á at koma í samband við børnini. Eftir norðurlendskari fyrimynd varð Ferðsluringur Barnanna stovnaður.

**2**
**Børnini á vitjan**
Mong eru børnini, sum hava vitjað skrivstovuna hjá RFF. Her vitja børn á skrivstovuni hjá ráðnum við Skansan í Havn.

**3**
**Faldarar sum upplýsing**
RFF hevur framleitt nógv upplýsingartilfar millum ár og dag. Hesin faldarin greiðir frá, hvussu børn skulu bera seg at í ferðsluni, tá tey ganga í skúla.

# Ráðið slær ring um børnini

Millum tey átøk, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd fór undir tey fyrstu árini, var at gera faldarar um hálkukoyring, myrkakoyring og prutl, lýsingar um rúsdrekkakoyring og tilfar um skreiðing, so bilførarar skuldu ansa eftir børnunum.

Ráðið setti sær eisini fyri at koma á tal við børnini sjálv. Longu í 1977 varð eitt uppskot viðgjørt á starvsnevndarfundi um at biðja fólk uttanífrá fyrireika ein barnaferðsluklubba eftir danskari ella íslendskari fyrimynd.

Hugskotið átti Petur Jacob Sigvardsen, sum hevði verið á eini ráðstevnu fyri skúlakonsulentar í Kongsberg. Eftir ráðstevnuna læt hann ráðnum eina drúgva frágreiðing, har hann millum annað greiddi frá, hvussu ein tílíkur klubbi kundi skipast.

Tankin var at koma beinleiðis í samband við smæstu borgararnar í landinum, so teir so tíðliga sum gjørligt kundu gerast tilvitaðir um ferðslu. Hetta skuldi gerast við at senda upplýsingartilfar heim til børnini og foreldrini.

Barnaferðsluklubbin fekk navnið Ferðsluringur Barnanna. Hann vendi sær til børn millum 3 og 7 ár og fór av álvara at virka í 1984.

Á ráðsfundinum í 1985 staðfesti formaðurin, at undirtøkan millum smæstu borgararnar í landinum fyri tiltakinum hevði verið stak góð. 75 prosent av øllum børnunum høvdu tikið av tilboðnum um at gerast limir í ferðsluringinum.

Síðan hevur Ferðsluringur Barnanna virkað sum eitt afturvendandi átak at gera komandi bilførarar tilvitaðar um týdningin av tryggari ferðslu. Fjølbroytt upplýsingartilfar hevur verið sent børnunum, og tey hava kent seg at vera partur av eini týdningarmiklari søk.

Ein annar máti, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur vent sær til smæstu borgararnar, hevur verið at senda øllum børnum, sum fara í 1. flokk, tilfar um ferðslu.

Ráðið hevur eisini skipað fyri nógvum kappingum fyri børn. Onkuntíð hava tey kappast um at tekna tað vakrasta endurskinið, og í skúlum hevur verið kappast um, hvør flokkur er raskastur at nýta endurskin.



# Skrivstova við mongum leiklutum

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur havt skrivstovu í fýra ymiskum bygningum í Havn síðan 1976.

Tey fyrstu árini var skrivstovan í hølunum hjá KFUM við Hoydalsvegin. Síðan flutti hon í Kopargøtu, har sonevnda Sápuhúsið einaferð var. Seinni varð flutt í bygningin hjá Svend Krosstein yvir av Skansanum og í 1993 í verandi hølir Yviri við Strond.

Skrivstovan var fyrst og fremst ætlað at vera karmur um umsitingina hjá ráðnum. Men á ársfundinum í 1982 kundi formaðurin staðfesta, at skrivstovan nú virkaði sum ein brúkarastova. Fólk ringdu á skrivstovuna um skeltir og endurskin, og kommunur bóðu um góð ráð í sambandi við vegagerðir.

Hesin virkni leikluturin hjá skrivstovuni vant alsamt meira upp á seg. Hóast ráðið helst ikki kappast við handilslívið um at selja ferðsluútgerð, hevur leingi borið til at keypa súkkluhjálmar, endurskin og endurskinsvestar á skrivstovuni. Eisini ber til at leiga bilstólar til børn og læna bøkur um koyriroyndir og trygdarviðurskifti.

Ráðið eggjar samstundis handlum til at selja alla neyðuga ferðsluútgerð fyri ein rímiligan penga, so hon altíð er til taks og ikki er ov kostnaðarmikil at fáa hendur á.

Umvegis heimasíðuna heitir ráðið eisini á borgarar um at gera vart við vandar í ferðsluni, sum teir eru varugir við. Við boðskapinum "Hevur tú sæð vandan, er ábyrgdin tín" hevur tað eydnast ráðnum at fáa nógv fólk at gera vart við seg. Fólk senda heimasíðuni skrivligar frágreiðingar og myndir, sum lýsa trupulleikarnar.

Ein riðil av fólki hevur millum ár og dag vitjað skrivstovuna í sambandi við undirvísing av ymsum slag. Fleiri ferðir um vikuna koma barnagarðar og skúlaflokkar á gátt. Børnini síggja filmar og verða kunnað um, hvussu týdningarmikið tað er at brúka endurskin og fallhjálm.

Nógv børn hava eisini verið ein túr í Hvølvusi og Gølli. Har hava tey merkt á egnum kroppi, hvussu týdningarmikið trygdarbeltið er, skuldi bilurin brádliga bóltað rút.



1



2

3



> Á ársfundinum í 1982 kundi formaðurin staðfesta, at skrivstovan nú virkaði sum ein brúkarastova. Fólk ringdu á skrivstovuna um skeltir og endurskin, og kommunur bóðu um góð ráð í sambandi við vegagerðir.

1
**Kemm Poulsen**
Eitt av leyst knýttu hjálparfólkunum hjá RFF í mong ár. Hevur verið hollur stuðul í sambandi við tiltøk av alskyns slagi.

2
**Hvølvus**
Hvat hava løgtingsmenn, borgar-stjórar og børn í 1. flokki til felags? Tey hava roynt Hvølvus! Øll, sum hava roynt hann, hava merkt á egnum kroppi, hvørjar kreftir eru upp á spæl, tá bilurin koppar.

3
**Trygg á leiðini**
Skalt tú út í myrkrið, mást tú síggjast. Børn vitja skrivstovuna Yviri við Strond. Við endurskinsvestum eru tey tryggari á leiðini.

**1**
**Síðsta skríggj**
Við 13 nýggjum sangum fór RFF í 1997 undir átakið Síðsta Skríggj. Fleiri av sangunum rungaðu leingi í útvarpinum.

**2**
**Stýr tær**
Kanska beinraknasti boðskapurin hjá RFF nakrantíð. Sangurin við sama heiti kom út í 1989. Øll vita, hvat tað er at hava bilskil.

**3**
**Selatrúgvi**
Føroyar fingu ikki lóg um trygdarbelti fyrr enn í 1986. Selatrúgvi skuldi gera fólk tilvitað um týdningin av at sita íbundin.




1




2



"Deyðin kennir spenning,
tá maður koyrir við kenning"

# Venda sær til ungdómin við tónleiki

Ein týdningarmikil partur av arbeiðinum hjá teimum, sum hava staðið á odda fyri Ráðnum fyri Ferðslutrygd, hevur verið at finna útav, hvussu boðskapurin hjá ráðnum best kundi berast fram.

Fyrstu árini vóru summir av lýsingartekstunum ímóti rúsdrekka-koyring rættiliga mergjaðir. Orðaljóðið í einari lýsing var: “Deyðin kennir spenning, tá maður koyrir við kenning.” Ein onnur ljóðaði: “Maður hevur vandan við lið, sum ikki aktar koyrisið.”

Seinni gjørdist boðskapurin einfaldari og meira beint á. Orsakað av mongu deyðsvanlukkunum í áttatiárunum gjørdi Ráðið fyri Ferðslutrygd í 1989 av at koma á tal við ungdómin við tónleiki.

Martin Joensen og Jóhannus á Rógvu Joensen vórðu bidnir um at standa fyri eini útgávu við ferðslusangum. Úrslitið var eitt kassettuband við áður útgivnum sangum um ferðslu og nýsmíðaða lagnum “Stýr tær,” sum Karl Martin Samuelsen og Rúna á Heygum sungu.

Í fleiri ár rungaði hesin sangurin í útvarpinum og millum ung-fólk, og ongin kundi fara skeivur av boðskapinum, sum tey bæði so inniliga bóru fram í niðurlagnum: “Stýr tær – hav bilskil!”

Í 1997 vendi ráðið sær aftur til ungdómin við tónleikaútgávu. Hesa ferð kallaðist útgávan “Síðsta skríggj.” Uni Arge og Jóhannus á Rógvu Joensen gjørdu orð og løg til allar 13 sangirnar. Í hesum sambandi varð ein undirvísingarpakki latin skúlunum, so teir kundu brúka innihaldið á fløguni í ferðslufrálæruni.

Fleiri av sangunum vóru nógv at hoyra í útvarpinum. Sangurin um tann illa unga mannin handan róðrið, “Turbo Petur,”og “Eitt forelskað par,” sum segði frá gentuni, ið fór upp í tann skeiva bilin og doyði, vórðu endurútgivnir í 2000 á útgávuni “Ung um alda-mótið.”

Annar tónleikur, sum ráðið hevur verið við til at givið út, eru sangirnir “Spenn trygdarbeltið” og “Nýt hjálm” hjá Hera Nolsøe og Jóhannusi á Rógvu Joensen, sum Karl Martin og Margreta sungu, og tveir sangir, sum Regin Patursson og Oskar Hermansen gjørdu. Hesir báðir sangirnir vórðu prentaðir á mjólkapakkarnar hjá Mjólkavirki Búnaðarmanna. Annar var um Selatrúgva, sum Oskar Hermansen yrkti eftir lagnum til Sáru.

Fleiri aðrir sangir, sum Oskar Hermansen og Olivur Næss helst hava yrkt, finnast annars í savninum hjá ráðnum.



3

# Fleiri bilar og fleiri vanlukkur

Onki løgið var í tí, at føroyingar eins og norðurlendsku grannatjóðirnar funnu uppá at stovna egið ferðsluráð at upplýsa borgarar og myndugleikar um týdningin av tryggari ferðslu. Heldur onki løgið var í tí, at hetta hendi júst í sjeytiárunum.

Søgan um bilferðsluna í Føroyum byrjar í 1922. Tá kom fyrsti bilurin til landið. Uppaftur fleiri komu árini eftir, og bilarnir vóru hent flutningsamboð hjá teimum, sum hættaðu sær at koyra teir, og sum annars funnu vegir at koyra á, tí teir vóru fáir tá.

Men bilarnir vóru ikki bara hentir. Teir vóru eisini ein hóttan. Fólk kundu fáa skaða ella doyggja í ferðsluni.

Tann fyrsta deyðsvanlukkan á føroyskum vegi var í 1928. Síðan hesa vanlukkuna eru 255 fólk deyð av ferðsluávum. Til samanberingar mistu Føroyar øll krígsárini 132 mans á sjónum.

Nágreinilig tøl yvir, hvussu nógv fólk hava fingið skaða í ferðsluni, síðan fyrsti bilurin kom, finnast ikki. Men landslæknin hevur mett, at um 6.075 fólk hava fingið skaða í ferðsluni, og av teimum hava 608 fingið varandi mein.

Verður hugt eftir, nær flestu ferðsluvanlukkarnar hava verið, sæst eitt týðiligt mynstur fyri og eftir 1970. Í 1969 vóru 3001 bilar í Føroyum. Frammanundan doyðu árliga 2-3 fólk í meðal.

Tá sjeytiárini komu, broyttist samfelagið nógv. Samferðslukervið varð útbygd við nýggjum vegum og tunlum, fólk fingu fleiri pengar um hendi, og bilatalið øktist. Í 1974 vóru 6.825 bilar í landinum og í 1981 fleiri enn 12.000.

Hetta sást aftur í vanlukkutølunum. Í 1974, tá Tryggingarsambandið fór at kanna møguleikarnar at stovna eitt ferðsluráð í Føroyum, doyðu 13 fólk í ferðsluni. So syndarligur hevði standurin ongantíð verið fyrr, og ilt var tí ikki at síggja, at stundin var komin at gera ferðsluna tryggari.

**1**
**Bløðini skriva**
Ófrættatíðindini í bløðunum gjørdust fleiri í sjeytiárunum. Við økta bilatalinum øktist talið á ferðsluvanlukkum. Stundum stóðust vanlukkurnar av skilaleysari koyring.

**2**
**Tal á bilum og deyðum**
Talvan vísir, at frá 1970 til 1990, tá bilatalið øktist nógv, vaks talið á deyðum. Men nú talið á bilum er hægri enn nakrantíð, er talið á deyðum lutfalsliga ógvuliga lágt.
Tað gongur framá.



Koyrdu 70 km/t í 10 metra sýni

Fleiri bilar koyrdu viðari, tá politiið royndi at steðga teimum

1

> Tá sjeytiárini komu, broyttist samfelagið nógv. Samferðslukervið varð útbygt, fólk fingu fleiri pengar, og bilatalið øktist.

**Deyð í ferðsluni í Føroyum og talið á bilum í tíðarskeiðinum 1928-2005**




2

# Tey syndarligu áttatiárini

Vóru vanlukkutølini í sjeytiárunum ein fyriboðan um, hvat henda kundi, tá bilatalið øktist, og vegirnir gjørdust betri, so staðfestu áttatiárini, at tað var deyðans álvari at stuttleika sær í bili.

Ferð eftir ferð doyðu ungfólk í ferðsluni hesi árini, og trupulleikin varð eisini tikin upp á ársfundinum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í 1985. Formaðurin, Niels Juel Arge, staðfesti, at 1984 var eitt dapurt ár. Níggju fólk doyðu, og tað var ræðuligt, helt hann. Rúsdrekka og ov nógv ferð vóru í flestu førum orsøkin.

Umrøtt varð á fundinum, um krevjast skuldi við lóg, at fólk í bili sótu í trygdarbelti. Eitt sjónarmið var, at hetta bar illa til at krevja, tí løgreglan kundi ikki ansa eftir, at lógin varð hildin. Men umboðið fyri Føroya Læknafelag, Óli Mikkelsen, helt, at nýtsla av trygdarbelti skuldi ásetast við lóg, og fólk skuldu fáa bót, um tey ikki brúktu tað.

Ráðið fekk at sanna í 1986, at tað var bráðneyðugt at viðgera hendan spurningin. Hetta árið doyðu 14 fólk í ferðsluni. Tað var tað mesta nakrantíð. Á ársfundinum í 1988 upplýsti formaðurin, at 1987 var eisini eitt syndarligt ár. Tá doyðu 12 fólk. Niels Juel Arge staðfesti:

"Hetta er líka ringt sum nøkur av teimum ringastu vanlukku-árunum, tá sluppirnar vóru. Tá fóru í meðal 10 mans um árið. Tað var nakað, sum gav ekkó allastaðni, men í dag mugu vit siga, at fólk verða ikki skelkað av hesum veruleika, so her síggja vit eina stóra mentalitetsbroyting."

Men betri tíðir vóru hóast alt fyri framman. Í 1989 doyðu sjey fólk, í 1990 sjey og í 1991 eitt. Ilt er at siga við vissu, hví deyðsvan-lukkurnar minkaðu. Men orsøkirnar vóru helst, at bilatalið minkaði av búskaparkreppuni, og at ferðslulógin varð herd.

Í 1986 varð á fyrsta sinni kravt við lóg í Føroyum, at fólk skuldu sita íbundin í bili. Í 1988 varð ásett, at bilførarar mistu koyrikortið, høvdu teir meira enn 0,8 promillu í blóðinum. Eisini varð ásett tá, at bilførarar mistu koyrikortið, fóru teir meira enn 30 km/t upp um mest loyvdu ferð.

Seinastu 10 árini hevur talið á deyðum í ferðsluni í meðal verið fýra um árið.

> Í 1986 varð á fyrsta sinni kravt við lóg í Føroyum, at fólk skuldu sita íbundin í bili.

1





# Ungfólk í fleiri ferðsluvanlukkum

Soleiðis endar tað ofta

...riggjar ferðsluvanlukkur ...va verið í landinum í ...skiftinum. Í øllum ...vóru ...ilførarar-

## Ein fluttur á Ríkissjúkrahúsið

Sunnunáttina hendi ein ferðsluvanlukka í Klaksvík. Fýra um 18 ára aldur rendu á eitt skelti, ein pela og ein garð í Víkunu... niðan fyri Norð...

Mánamorgunin koyrdi ei... galið á Eystara Ring... Havn. Bilførarin... ára gamal, sl... leys...

2



3

1
**Spenn Beltið**
Á sumri 2005 varð skipað fyri upplýsingarátaki fyri at fáa fólk at nýta trygdarbeltið. Umframt nógvar lýsingar í útvarpi vóru skelti sett fram við vegirnar um alt landið. Eftir átakið øktist nýtslan av bilbelti úr 55% í 82%.

2
**Vanlukkur í áttatiárunum**
Ferð eftir ferð kundu fjølmiðlarnir siga frá syndarligum vanlukkum í áttatiárunum. RFF helt tað vera bráðneyðugt at fáa bøtt um støðuna. Hon batnaði eisini so líðandi. Helst vendi gongdin, tí ferðslulógin varð herd, og tí bilatalið minkaði av búskaparkreppuni.

3
**Ov nógv ferð**
Spenningurin er øgiligur, tá ferðin er nógv, og landslagið uttanfyri strýkur framvið. Men tá biltúrurin endar á takinum, er tað deyðans álvari. Viðhvørt fara bilarnir so illa í vanlukkum, at fólk mugu klippast leys.



1

# Tætt samband við skúlarnar

Eitt av endamálunum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd var frá byrjan at virka fyri at fáa ferðslulæru sum kravda lærugrein í skúlunum. Samsvarandi hesi stevnu fór ráðið í áttatiárunum undir at bjóða lærarum, pedagogum og politistum á skeið í ferðslulæru.

Men striltið gekst at fáa ferðslulæru sum kravda lærugrein. Á ársfundinum í 1988 harmaðist formaðurin um hetta. Hann nevndi, at skúlin hevði givið innivist fyri 45 tímum í ferðslulæru yvir níggju ár, men tað var alt ov lítið, helt hann.

Fleiri royndir vórðu tó gjørdar at bøta um støðuna. Dagligi leiðarin, Olivur Næss, gekk á odda at skipa fyri ferðsluvikum í fólkaskúlanum og miðnámsskúlum. Eisini helt hann fyrilestrar á skúlunum. Í 1988 setti ráðið eisini ein ferðsluráðgeva at vera bindilið millum ráðið og skúlaverkið. Hans Jacob Hermanssen røkti hetta starvið í fimm ár.

Í 1993 skuldi ráðið finna nýggjan dagligan leiðara fyri Olivur Næss, sum andaðist í 1992 eftir 14 ár í sessinum. Heilar 36 umsóknir vóru til starvið, og settur varð Jón Kragesteen, fólkaskúlalærari. Sama ár tók Petur Jacob Sigvardsen við formanssessinum eftir Niels Juel Arge, sum takkaði fyri seg eftir 17 ár í sessinum.

Hetta árið fekk ráðið sum so mong onnur sviðan at kenna av búskaparkreppuni. Landsstýrið og Tryggingarsambandið skerdu sínar játtanir til ráðið. Ein avleiðing av tí var, at nýggi leiðarin og starvsnevndin gjørdu av at gevast við skeiðunum fyri lærarum, pedagogum og politistum. Í staðin varð dentur lagdur á at samstarva beinleiðis við skúlarnar.

2



3



4



Hetta hevur verið gjørt á ymsan hátt síðan. Í 1996 skipaði ráðið fyri átakinum "Betri fyrivarin enn eftirsnarin" saman við Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum, Arbeiðseftirlitinum, Føroya Brunatrygging og AIDS-ráðnum. Skipað varð fyri stórum tiltøkum í ítróttarhallum kring landið í tilsamans 30 dagar, og 7.000 børn møttu upp.

Síðan 1999 hava øll børn í 1. flokki eisini hvørt ár verið boðin til stórt tiltak um at nýta súkkluhjálm. Við hjálp frá góðum stuðlum hevur ráðið kunnað givið børnunum ein súkkluhjálm í part ókeypis. Eini 4.500 børn hava fingið hjálm.

Tað kanska týdningarmesta átakið í sambandi við skúlan hevur verið, at allir 9. flokkarnir í landinum síðan 1998 hava verið á dags-skeiði hjá ráðnum. Ráðið skipar fyri skeiðunum saman við Ambulansutænastuni, Heilbrigdi, koyrilærarum og ferðsluoffrum.

Endamálið við skeiðunum er at fáa næmingarnar at skilja, hvussu nær vandanum teir í veruleikanum eru. Ráðið hevur valt sær 9. flokk sum málbók, tí hetta er seinasti møguleikin at koma á tal við ein heilan árgang í fólkaskúlanum, áðrenn koyrikortið skal takast.

**1**
**Børnini vitja**
Olivur Næss hevur fingið vitjan av skúlabørnum. Hann vísir teimum, hvussu endurskinið skal festast á súkkluna.

**2**
**Jón Kragesteen**
Tók við sum dagligur leiðari eftir Olivur Næss í 1993. Hevur staðið á odda fyri praktiska arbeiðinum hjá ráðnum síðan tá. Sum uppfinnari av nýggjum tiltøkum og sum almenn rødd hevur hann verið ótroyttiligur.

**3**
**Hans Jacob Hermanssen**
Tá RFF vildi hava tættari samband við skúlaverkið, setti ráðið ein ferðsluráðgeva at vera bindilið millum skúlaverkið og RFF. Hans Jacob Hermanssen var ferðsluráðgevi frá 1988 til 1993.

**4**
**Nýt hjálm**
Síðan 1999 hevur RFF hvørt ár boðið øllum børnum í 1. flokki til stórt tiltak um at nýta súkklu-hjálm. 4.500 børn hava í hesum sambandi fingið ókeypis hjálm á høvdið. Tað var Kiwanis, sum upprunaliga tók stig til tiltakið. Stuðlar øll árini hava verið MBM, Føroya Sparikassi og Skipafelagið.



1



2

3



1
**Yvir um vegin**
Móðir og dóttir á veg yvir um gonguteig. Við júst hendan gonguteigin hevur onkur álvarslig vanlukka verið. Tí eru umstøðurnar broyttar á hesum stað í dag.

2
**Børn í ferðsluni**
Við keppi á høvdinum á veg yvir um vegin í 1. flokk. Hesar genturnar fara í Argja skúla og skulu ansa eftir oljubilinum, sum kemur um svingið.

3
**Skeið um Nullhugsjón**
Á hesum skeiðnum í 1999 setti RFF sjøtul á arbeiðið at kunna allar viðkomandi myndugleikar um Nullhugsjónina. Umboð fyri sløkkilið, tryggingar, býráð og løgreglu síggjast á myndini.

# Fáa nýggjan íblástur úr Svøríki

Ráðið fyri Ferðslutrygd varð stovnað fyri at gera ferðsluna tryggari. Men tað var ikki fyrr enn í 1997, at ráðið fór at umrøða, hvussu trygg ferðslan skuldi gerast. Svarið varð funnið í Svøríki, har tey sama ár høvdu sett sær sum mál, at ongin skuldi doyggja ella fáa álvarsligt mein í ferðsluni.

Á ársfundinum í 1999 gjørdi formaðurin, Petur Jacob Sigvardsen, nógv burtur úr hesum svenska málsetninginum, ið nevndist Nullhugsjónin. Hann segði, at fólk flest høvdu lyndi til at halda, at tað var í lagi, at ferðslan viðhvørt elvdi til fólkaskaða og lívlát. Onki var at gera við hetta, tóktust fólk at halda.

Formaðurin helt, at hendan hugburðin skuldi ráðið stremba eftir at broyta. Hann nevndi, at í Svøríki doyðu miðskeiðis í nítiárunum um 1.400 fólk árliga. Men síðan sviar vóru farnir at arbeiða eftir Nullhugsjónini, var talið á deyðum komið niður á 550. Petur Jacob Sigvardsen segði:

"Sig so ikki, at 0-hugsjónin er ein veruleikafjarur dreymur. Tølini á teimum, ið doyggja ella verða álvarsliga skadd í ferðsluni, skulu lækka alsamt alla tíðina. Avleiðingin av hesum stevnumiði er tann, at einaferð skal rísa tann dagur, at einki menniskja skal doyggja ella verða skatt í ferðsluni. Og ikki fyrr enn tann dag hava vit nátt endmáli okkara í RFF."

Jón Kragesteen og Petur Jacob Sigvardsen hildu í 1999 eitt skeið um Nullhugsjónina fyri 45 fólkum, ið á onkran hátt høvdu við ferðslu at gera. Luttakararunum varð upplýst, at sambært hugsjónini hava bæði borgarar og myndugleikar ábyrgd av, at ferðslan er trygg. Men høvuðsábyrgdina hava tey, sum gera vegir, tunlar og brýr, og tey, sum smíða lógirnar.

Á skeiðnum var semja um at biðja politikararnar syrgja fyri, at samtyktur varð ein ferðslutrygdarpolitikkur á Føroya løgtingi í seinasta lagi ár 2000 við Nullhugsjónini sum grundarlagi. Landsstýrismaðurin í ferðslumálum, sum ikki fekk verið á skeiðnum, fekk seinni fráboðanina handaða.

Landsstýrismaðurin fegnaðist um áheitanina og segði seg taka undir við henni av heilum huga. Hann helt, at tað, sum nú var at gera, var at seta niður ein arbeiðsbólk at orða eitt álit um framtíðar ferðslutrygdarpolitikkin í Føroyum. Álitið skuldi so brúkast sum grundarlag undir einum aðalorðaskifti í løgtinginum um ferðslutrygdarpolitikkin.

"Sig so ikki, at 0-hugsjónin er ein veruleikafjarur dreymur. Tølini á teimum, ið doyggja ella verða álvarsliga skadd í ferðsluni, skulu lækka alsamt alla tíðina. Avleiðingin av hesum stevnumiði er tann, at einaferð skal rísa tann dagur, at einki menniskja skal doyggja ella verða skatt í ferðsluni.


Hevur tú sæð vandan....
..er ábyrgdin tín, ger tað, tú kanst!
.......her verður galið.....
........hvat halda onnur?
................skriva niður!
Tosa við myndugleikar!
.......jú fleiri, tess betur!
........far til almenningin!
.......savna undirskriftir!
Tá ið alt endar væl.......

1

# Viðtøkurnar verða dagførdar

Ráðið fyri Ferðslutrygd gjørdi í 1998 av at broyta sínar egnu viðtøkur. Hetta var neyðugt, hildu ráðslimir, tí orðingarnar í viðtøkunum frá 1976 vóru vorðnar heldur ótíðarhóskandi.

Í teimum fyrstu viðtøkunum stóð sovorðið sum, at ráðið skuldi "skipa fyri upptøku av filmum um vandamiklar ferðslutilburðir" og vísa teir fram í "ljósmyndarhølum." Hetta virkaði avoldað, nú føroyingar høvdu sæð film í sjónvarpinum í mong ár.

Viðtøkubroytingarnar í 1998 broyttu ikki sjálvt endamálið hjá ráðnum. Í fyrstu reglu varð staðfest, at endamálið var at gera ferðsluna tryggari. Síðan stóð í átta reglum, hvussu hetta skuldi gerast.

Ráðið skuldi arbeiða fyri at betra um ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi, stuðla ferðsluundirvísingini við ráðgeving og útvega tíðarhóskandi og viðkomandi undirvísingarmiðlar í ferðslulæru.

Eisini skuldi ráðið skipa fyri skeiðvirksemi og trygdarfremjandi verkætlanum, geva sakliga upplýsing um øll viðurskifti, sum vóru til ampa fyri ferðslutrygdina, og samstarva í góðum stevi við myndugleikar, stovnar og einstaklingar í ferðslutrygdarspurningum.

Haraftrat skuldi ráðið, eins og viðtøkurnar frá 1976 søgdu, fáa til vega viðkomandi upplýsingar um ferðsluvanlukkur og tryggja sær innivist í fjølmiðlunum.

Samstundis sum viðtøkurnar vórðu broyttar, varð gjørd ein virksemisætlan, sum útgreinaði, hvussu ráðið skuldi útinna sín setning. Nýggj reglugerð varð eisini gjørd fyri starvsnevndina og dagliga leiðaran.

Ein týðandi broyting varð gjørd í viðtøkunum aftur í 2002. Tá varð samtykt, at einstaklingar og vinnurekandi feløg og fyritøkur, sum vildu vera við í arbeiðinum fyri ferðslutrygd, skuldu kunna gerast limir í ráðnum.

Við hesi samtykt er arbeiðið fyri ferðslutrygd í Føroyum vorðið eitt mál fyri ein og hvønn, sum hevur hug at vera við. Allir viðkomandi stovnar, allar fyritøkur, um tær eru vinnurekandi ella ikki, og allir borgarar kunnu gerast limir í ráðnum.

> "Arbeiðið fyri ferðslutrygd í Føroyum er vorðið eitt mál fyri ein og hvønn, sum hevur hug at vera við. Allir viðkomandi stovnar, allar fyritøkur, um tær eru vinnurekandi ella ikki, og allir borgarar kunnu gerast limir í ráðnum.

**1**
Ein av málrættaðu ætlanunum hjá RFF er at fáa fólk at siga frá, tá tey gerast varug við vandar í ferðsluni. Vendir borgari sær til RFF við einum vandamáli, verður málið beinanvegin borið rætta myndgleikanum. RFF hevur greið tilmæli um, hvussu viðurskiftini í vegaumhvørvinum eiga at verða skipað. Setningurin hjá RFF er við viti og skili at tala til vit og skil.

# Ráðið skrivar álit um Nullhugsjónina

Tað gekk ikki júst, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd væntaði í 1999, at settur varð ein arbeiðsbólkur undir landsstýrismanninum at gera álit um Nullhugsjónina. Hetta harmaðist formaðurin almikið um á ársfundinum í 2001. Petur Jacob Sigvardsen segði:

"Vit vóru ov bláoygd at vóna, at Føroyar kundu verða fyrsta landið aftan á Svøríki. Vit fingu annað at síggja, og úrslitið er, at vit standa við skommini sum eitt av teimum londum, ið als ongan ferðslutrygdarpolitikk hava."

Síðan staðfesti hann: "Á ferðlutrygdarpolitiska økinum ganga vit tí í blindum. Vit hava onki endamál sett okkum, vit hava onga stevnu, einki sum helst stavnhald, vit trilva okkum fram uttan mál ella mið, og okkara einasta leiðarstjørna er ein gomul pjøssað ferðslulóg."

Formaðurin gjørdi tó greitt, at Ráðið fyri Ferðslutrygd hevði sett sær fyri ikki at gevast á hondum í hesum máli. Starvsnevndin hevði havt fleiri fundir um Nullhugsjónina, og ráðið fór nú sjálvt at fáa álitið um Nullhugsjónina skrivað.

Petur Jacob Sigvardsen og Jón Kragesteen tóku sær í felag av at greiða álitið úr hondum. Álitið var liðugt í mars 2003. Í tí var hópur av viðkomandi upplýsingum um ferðslu í Føroyum og ein langur listi av tilmælum um, hvussu ferðslan kundi gerast tryggari.

Høvuðstilmælið til løgtingið ljóðaði soleiðis: "Miðað verður eftir í framtíðini, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku í vegaflutningsskipanini, og at alt virksemi, sum hevur við ferðslu at gera, skal vera í samljóði við hetta stavnhaldið."

Til tess at røkka hesum máli skuldi beinanvegin farast undir at gera munagóðar ábøtur á kommunalar vegir og landsvegir. Miðast skuldi eisini eftir, at akfør altíð skuldu lúka fremstu trygdarkrøv, at ferðslulógin áhaldandi varð endurnýggjað, og at eftirlitið við ferðsluni varð styrkt. Eisini skuldi dentur áhaldandi verða lagdur á at upplýsa fólk um ferðslutryggan hugburð.

Ítøkiliga stavnhaldið skuldi verða, at meðaltalið á teimum, sum doyggja ella verða álvarsliga skadd í ferðsluni í Føroyum, skuldi lækka í minsta lagi 40 prosent komandi 10 árini.



1

1
**Alt hevur ein prís!**
Hvussu skal ungdómurin fáast at fata, at spæl í ferðsluni er deyðans álvari? Henda lýsingin hjá RFF ballar onki inn.

2
**Álitið um Nullhugsjónina**
Við álitinum um Nullhugsjónina hevur RFF lagt lunnar undir ferðslutrygdarpolitikkin í framtíðini. Upprunaliga skuldi ein nevnd undir landsstýrinum skriva álit um Nullhugsjónina. Tann nevndin varð ongantíð sett, og tí tóku Petur Jacob Sigvardsen og Jón Kragesteen sjálvir um endan og skrivaðu álitið.



## Við fullsettum flogfari uttanlands

Í tveimum førum hevur RFF skipað fyri dagsskeiði uttanlands. Í báðum førum varð farið avstað um morgunin við 90 fólkum, og komið varð aftur um kvøldið. Málbólkurin var fyrst og fremst politikarar og onnur, sum taka avgerðir um ferðsluspurningar.

Í 2001 varð skipað fyri dagsskeiði í Trollhättan í Svøríki, har luttakararnir fingu høvi at royna sonevndu "Nollvisions-slingorna." Við bilum, sum vóru útgjørdir við ferðavmarkarum, varð koyrt í einum øki, sum serliga var gjørt til tey veiku í ferðsluni.

Í 2005 varð skipað fyri dagsskeiði í Roskilde í Danmark. Á hesi ferð fingu luttakararnir høvi til at síggja, hvussu kommunan í Roskilde hevði arbeitt við ferðslutrygdarspurningum. Eisini fingu luttakararnir høvi at royna seg á hálkubreyt.




2

Miðað verður eftir í framtíðini, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku í vegaflutningsskipanini, og at alt virksemi, sum hevur við ferðslu at gera, skal vera í samljóði við hetta stavnhaldið.



1

> Við álitinum um Nullhugsjónina fingust til vega nógv hagtøl, sum vístu, hvørjir borgarar vóru í størst vanda fyri at láta lív í ferðsluni og hví.




2

1
**Blómur í náttúruni**
Seinnu árini hevur ein dag um árið verið skipað fyri minningardegi teirra, ið fóru í ferðsluni. Ein máti at minnast tey deyðu er at leggja blómur á staðið, har vanlukkan var. Tað er Ingi Gunnarson, sum hevur staðið fyri at samskipa hetta tiltak.

2
**Børn til gongu**
Bilurin er steðgaður og loyvir skúladreingjunum yvirum.

# Ungir menn oftast í deyðsvanlukkum

Við álitinum um Nullhugsjónina fingust til vega nógv hagtøl, sum vístu, hvørjir borgarar vóru í størst vanda fyri at láta lív í ferðsluni og hví.

Tá deyðsvanlukkurnar vóru flestar í áttatiárunum, staðfesti ársfundurin ferð eftir ferð, at ungir dreingir vóru uppi í teimum flestu. Í álitinum um Nullhugsjónina vórðu bæði aldur og eginleikar hjá hesum dreingjum neyvt lýstir. Sagt varð millum annað:

“Størstu vandamálini í ferðsluni her á landi eru vanlukkur, sum standast av, at 18-19 ára gamlir dreingir við koyrikorti stytta sær stundir í bili saman við javnaldrum og serliga gentum niður í 14-15 ára aldur. Tær allarflestu av hesum vanlukkunum standast av, at bilførararnir eru óroyndir, og at ferðin mangan er alt ov høg. Í nógvum førum hevur rúsdrekka eisini verið nýtt.”

Næststørsti trupulleikin í ferðsluni var sambært álitinum fólk til gongu, sum verða yvirkoyrd. Hagtølini vístu, at serliga børn og eldri fólk eru í vanda fyri at verða árend.

Tann triði stóri trupulleikin var vantandi nýtsla av trygdarbeltinum. Hesin trupulleikin ger seg galdandi fyri allar aldursbólkar. Eftir nógvar vanlukkur, har ungir menn eru deyðir ella hava fingið álvarsligt mein, hevur verið staðfest, at teir sótu ikki í trygdarbelti.

Tilmælini í álitinum um ábøtur vóru bæði mong og fjølbroytt. Eitt teirra snúði seg um at seta niður eina skaðanevnd við serkønum fólkum at kanna øll álvarslig ferðsluóhapp. Tvey onnur tilmæli vóru at lækka hámarksferðina í fjølbygdum øki úr 50 km/t niður í 30 km/t og at lækka promillumarkið úr 0,5 niður í 0,2.

Eitt annað týdningarmikið tilmæli var at geva ungfólkum millum 18 og 25 ár eitt royndarkoyrikort við serligum treytum. Ráðið hugsaði sær, at royndarkortið tey fyrstu árini skuldi minka í virði eftir eini stigaskipan, um bilførarin breyt ferðslulógina.

Sum dømið varð nevnt, at koyrikortið frá byrjan kundi vera vert 12 stig, og um bilførari so varð tikin við ongum stigi eftir á kortinum, skuldi hann missa tað í tríggjar mánaðir.

Millum londini, sum longu høvdu sett tílíkar skipanir í verk, vóru Týskland, Frakland, Avstralia, Japan og Ísland. Har vóru brotini á ferðslulógina og talið á álvarsligum vanlukkum minkað munandi, varð staðfest í álitinum.




3

**Koyrikort sum klippikort**
Eitt av tilmælunum í Nullhugsjónini er at gera koyrikortið til klippikort. Brýtur tú lógina, fært tú eitt klipp. Tá klippini eru uppi, missir tú kortið.



1

1
**Løgtingið**
Nullhugsjónin varð væl móttikin í løgtinginum.

2
**Blað um Nullhugsjónina**
Hetta blaðið varð sent í hvørt hús, tá tingið viðgjørdi Nullhugsjónina.

# Løgtingið fagnar Nullhugsjónini

Mong av málunum, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur samtykt, eru samtykt, tí ráðið helt tað vera sjálvsagt at fremja tey. Men tað hevur ikki altíð verið so sjálvsagt, at landsins myndugleikar beinanvegin gjørdu samtyktirnar til almennan politikk.

Soleiðis var eisini við Nullhugsjónini. Frá tí, at landsstýrið segði seg vilja arbeiða fyri Nullhugsjónini í 1999, til hon kom til viðgerðar í løgtinginum, gingu fimm ár. Men tá hon at enda kom í løgtingið, var undirtøkan fyri henni avbera góð.

Eftir at álitið um Nullhugsjónina var liðugt í mars 2003, samtykti ráðið at biðja landsstýrismannin við ferðslumálum leggja Nullhugsjónina fyri tingið. Hetta skuldi hann gera á heysti 2003. Men løgtingsval varð útskrivað í desember 2003, og málið varð tí seinkað.

Tað gjørdi minni, tí frammanundan høvdu nýggja forkvinnan, Rúna Sivertsen, og dagligi leiðarin, Jón Kragesteen, saman við starvsnevndini avrátt, at ráðið skuldi skipa fyri stórum upplýsingarátaki í sambandi við løgtingsviðgerðina. Nú fekk ráðið betri stundir at fyrireika seg.

Upplýsingarátakið fór av bakkastokki fyrst í apríl mánaði í 2004. Almenningurin og løgtingsfólk vórðu mint á innihaldið í Nullhugsjónini í útvarpslýsingum, sjónvarpslýsingum og litføgrum blað, sum varð sent í hvørt hús í landinum. Tann 13. apríl 2004 var so aðalorðaskifti um Nullhugsjónina í løgtinginum.




2

> Ætlanin hjá landsstýrinum er at fremja umfatandi broytingar í ferðslulógini og leggja tær fyri løgtingið í 2006. Tann týdningarmesta broytingin er, at Nullhugsjónin skal setast í fyrstu grein í lógini og á tann hátt gerast sjálvt høvuðsendamálið við lógini.

Rúna Sivertsen staðfesti í ársfrágreiðingini í 2005:

"Aðalorðaskiftið vardi í góðar fýra tímar og var bæði áhugavert og gott. Ætlanin hjá landsstýrinum var at leggja eitt uppskot til samtyktar um Nullhugsjónina fyri tingið eftir ólavsøku. Men undir aðalorðaskiftinum góvu fleiri løgtingsfólk til kennar, at tey hildu ikki, at eitt uppskot til samtyktar var nóg mikið."

Rúna Sivertsen helt, at sama hvussu løgtingið valdi at samtykkja Nullhugsjónina, so var ein løgtingssamtykt byrjanin til eina nýggja tíð, tí Føroyar fóru við Nullhugsjónini fyri fyrstu ferð at fáa eina yvirskipaða ferðslutrygdarætlan.

Ætlanin hjá landsstýrinum er at fremja umfatandi broytingar í ferðslulógini og leggja tær fyri løgtingið í 2006. Tann týdningarmesta broytingin er, at Nullhugsjónin skal setast í fyrstu grein í lógini og á tann hátt gerast sjálvt høvuðsendamálið við lógini.

Tá tað hendir, kann sigast, at arbeiðið fyri tryggari ferðslu, sum nógvar góðar kreftir settu í gongd í 1976, loksins er viðurkent til fulnar og vorðið almennur politikkur í Føroyum.

## DAGLIGIR LEIÐARAR

Eli Nolsøe 1976-1978
Oskar Hermansen aug-til okt 1978
Olivur Næss 1978 til 1992
Jón Kragesteen 1993-

## ARBEIÐSFÓLK Á RFF

Ása Joensen 1982-
Hans Jákup Hermanssen 1988-1993
Sigrún Brend 1994-95
Anna Louisa Joensen 2004-

## LEYS ARBEIÐSFÓLK

Kemm Poulsen
Herit Joensen
Óla Jákup Rólantsson
Jákup Thomassen
Snæbjørn í Dali

## STARVSNEVNDARFORMENN

Niels Juel Arge 1976-1993
Petur Jacob Sigvardsen 1993-2004
Rúna Sivertsen 2004-

## STARVSNEVNDARLIMIR

Petur Jacob Sigvard sen, næstformaður 1976 - 1993
Óli Mikkelsen 1976-1990
Eva Thomsen 1976-1980
Bjartur Dalsgarð 1976-1990
Óli Jacobsen 1980-1990
Jákup Jacobsen 1990-1997
Pál Weihe 90-93 næstformaður 1993-2000
Jákup N. Olsen 1990-2000 næstformaður 2000-

Eyðun Djurhuus 1994-2000
Hervør Hergudóttir 1997-
Høgni Djurhuus 2000-
Høgni í Stórustovu 2000-



Starvsnevnd í 2006:
Fremst f.v.: Hervør Hergudóttir, Rúna Sivertsen formaður, Høgni Djurhuus. Aftast f.v.: Jón Kragesteen skrivari, Jákup N. Olsen næstformaður, Høgni í Stórustovu.



RFF hevur tætt samstarv við hini ráðini fyri ferðslutrygd í Norðurlondum. Norðurlendskur fundur er á hvørjum ári. Á myndini, sum er tikin í Rovaniemi í Finnlandi 2004, eru leiðararnir savnaðir. Fremst f.v.: Monica Öhmann, NTF Svøríki, Leif Agnar Ellevset, Trygg Trafikk Noreg, Matti Jarvinen, Liikenneturva Finnland. Aftast f.v.: Jón Kragesteen, Ráðið fyri Ferðslutrygd Føroyar, Sigurður Helgason, Umferðarráð Ísland, René la Cour Sell, Rådet for Større Færdselssikkerhed Danmark.



Starvsfólkini á RFF í dag: Ása Joensen, Jón Kragesteen og Anna Louisa Joensen.

## FASTIR LIMIR

Akstovan, Føroya Kommunufelag, Føroya Koyrilærarafelag, Føroya Landfúti, Føroya Læknafelag, Føroya Lærarafelag, Kringvarp Føroya, Kvinnufelagssamskipan Føroya, Landsverkfrøðingsstovnurin, Tryggingarfelagið Trygd, Tryggingarfelagið Føroyar, Mentamálaráðið, Vinnumálaráðið, Kommunusamskipan Føroya.

## VANLIGIR LIMIR

Eiðis Kommuna, Fámjins Kommuna, Fuglafjarðar Kommuna, Fugloyar Kommuna, Gøtu Kommuna, Húsavíkar Kommuna, Hvannasunds Kommuna, Klaksvíkar Kommuna, Kvívíkar Kommuna, Miðvágs Kommuna, Mikladals Kommuna, Nes Kommuna, Porkeris Kommuna, Runavíkar Kommuna, Sandavágs Kommuna, Sands Kommuna, Skálavíkar Kommuna, Skopunar Kommuna, Sørvágs Kommuna, Sumbiar Kommuna, Svínoyar Kommuna, Tórshavnar Kommuna, Tvøroyrar Kommuna, Vágs Kommuna, Vestmanna Kommuna, Bussfelag Føroya, Føroya - MC, Føroya Politistafelag, Funnings Kommuna, Meginfelag Teirra Brekaðu, Strandfaraskip Landsins, Tórshavnar Súkklufelag.

## HEIÐURSLIMUR:

Petur Jacob Sigvardsen.

## EINSTAKLINGAR SUM ERU "FERÐSLUTRYGDARVINIR"

Byrjað varð við hesum í januar 2005, og fyrsti skrásetti limur er Ingi Gunnarson.

## VINNUREKANDI FYRITØKUR, SUM ERU "FERÐSLUTRYGDARSTUÐLAR":

Føroya Shell, AMA, SMS, Bakaríðið Hjá Gunnleivi, Statoil Føroyar, Bókadeild Føroya Lærarafelag, Vaktargarðurin, Farodane, H T Transport, Flogfelag Føroya, BR-leikur, Føroya Banki, Føroya Keypssamtøka, Føroya Lívstrygging, Føroya Sparikassi, Føroya Tele, Hotel Føroyar, Inni P/F, SLFarmur, Poul Hansen, Kaupting, Koyrikortið Sp/f, Leif Mohr, Meginfelag Búnaðarmanna, Auto Service.

## RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD ER FÍGGJAÐ AV

Føroya Landsstýri, Tryggingarfelagnum Føroyar, Trygd. Afturat hesum koma limagjøld frá limum og stuðlum.

Aðrir stuðlar gjøgnum árini hava verið m.a. Føroya Shell, Statoil Føroyar, Texaco Faroes Group, Føroya Sparikassi, MBM, Skipafelagið, Lív og Super Dekk. Í sambandi við útgávur hevur verið sera gott samstarv við Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunn.

Ráðið fyri Ferðslutrygd 2006